TING-HELLAN

# Støðið má vera høgt

**Skúlastjórin á Studenta- og HF-skeiðinum á Kambsdali, Sámal í Skoruni, sigur, at innihaldið í miðnámsskúlaútbúgvingini er týdningarmikið, men heldur kortini, at støðið á útbúgvingini hevur meira at siga**

ÚTBÚGVING
*Solby A. Eliasen*
solby@mail.djh.dk

- Sjálvandi hevur tað týdning fyri einstaka næmingin, hvat hann fer í holt við, tá hann tekur eina miðnámsútbúgving í Føroyum, men eins týdningarmikið er tað, at næmingurin fer í holt við eina útbúgving, har hann fær avbjóðingar, sigur Sámal í Skoruni.

Hann leggur eina við, at tað hevur nógv at siga, at næmingurin hevur fingið innlit í tær einstøku lærugreinarnar. Somuleiðis er tað eisini týdningarmikið, at næmingurin tekur eina útbúgving, har hann fær avbjóðingar á einum høgum støði. Eina miðnámsútbúgving, sum setur krøv.

- Tað er ikki tað ávísa í útbúgvingini, sum hevur størsta týdningin, men heldur, at næmingurin fær lagt høvdið í blot og fær avbjóðingar fyri heilan og lærir millum annað at samstarva við onnur, greiðir skúlastjórin frá.

## Føroysk løgfrøði

Tað er ein sannroynd, at flest allir føroyingar velja at útbúgva seg í Danmark. Hóast talið á lesandi føroyingum uttan fyri Norðanlond økist munandi, so fer bróðurparturin av ungu lesandi til Danmarkar. Í visjón 2015 røðuni hjá løgmanni á Ólavsøku varð millum annað nevnt, at føroyingar eiga at kunna taka fleiri hægri útbúgvingar í Føroyum. Hesum tekur skúlastjórin á Kambsdali undir við.

- Eg vildi fegin, at tað vóru so nógvar útbúgvingar í Føroyum, sum gjørligt, men vit mugu eisini vera realistisk og viðganga, at eitt



*Tey ungu, sum velja at taka eina miðnámsútbúgving í Føroyum, mugu møta avbjóðingum, og tað setur krøv til útbúgvingarstøðið, heldur Sámal í Skoruni, skúlastjóri á Studenta- og HF skeiðinum á Kambsdali*

nú serútbúgvingar kunnu vit ikki bjóða, heldur Sámal í Skoruni og vísir á, at kanningarstovur og gransking á sama støði sum í grannalondum okkara finst ikki í Føroyum.

Hann heldur fram, at tað er avmarkað, hvussu nógv knapt 50.000 fólk klára, men heldur kortini, at ein útbúgving sum løgfrøði átti at borið til at tikið í Føroyum.

- Hví skulu føroyingar fara til Danmarkar at taka alla løgfrøðisligu útbúgvingina, tá vit hava føroyskar lógir í Føroyum, spyr Sámal.

## Sunt at fara uttanlands

- Tað er sunt at koma út um garðarnar. At síggja, at onnur eru til, og hvussu teirra samfelag og mentan er. Tískil áttu vit heldur at lagt dent á, at streymurin av ungum til Danmarkar at nema sær hægri útbúgving skal steðga, heldur Sámal í Skoruni, sum ikki dugir at síggja endamálið í, at føroyingar fara til Danmarkar at lesa til dømis enskt, týskt ella franskt. Hví ikki fara til sjálvt landið og lesa tað, spyr hann.

- Harvið fær tann lesandi óivað onkran síðuvinning eisini. Á hasum økinum hava vit verið alt ov blind, heldur rektarin.

Hann heldur tó ikki, at føroyingar tilvitað fara til Danmarkar at lesa, tí tað er siður. Tað hevur meira við tað at gera, at føroyingar eru danskir statsborgarar, kenna Danmark best og tískil er tað lættast at fara niður at nema sær útbúgving.

- Vit skulu ansa okkum, at vit ikki eru ov heimføðislig, tí tað kann vera vandamikið. Tað er sera ónøktandi fyri okkum at síggja, at vit eru 15 ár aftan fyri allatíðina, bara tí vit fylgdu so illa við, sigur Sámal í Skoruni, skúlastjóri á Studenta og HF-skeiðinum á Kambsdali.

# Framskygni hevði hjálpt

**Nógvir føroyingar fara hvørt ár uttanlands at lesa. Mong koma ikki aftur á klettarnar at búgva. Jákup Sverri Kass, ráðslimur í MFS, heldur, at framskygni frá myndugleikunum hevði bøtt um hesa støðuna**

ÚTBÚGVING
*Solby A. Eliasen*
solby@mail.djh.dk

Ein trupulleiki, sum ofta hevur verið uppi og vent í Føroyum, er, at tá føroyingar fara av landinum at nema sær útbúgving, koma tey ikki aftur til landið.

- Líka frá fólkaskúlanum verður sagt við næmingarnar, at tey skulu taka eina hægri útbúgving. Men ongin sigur, hvat tey áttu farið at lisið ella hvørjum tørvur verður á í Føroyum um eini fimm til tíggju ár, sigur Jákup Sverri Kass.

Sum dømi nevnir hann tørvin á tannlæknum í Føroyum í dag. Jákup Sverri Kass er ráðslimur í Meginfelag Studenta, sum er ein felagsskapur, sum vegleiðir



*Jákup Sverri Kass, ráðslimur í Meginfelag Studenta, heldur, at framskygni innan útbúgvinarøkið hevði kunnað gjørt, at lesandi føroyingar uttanlands høvdu vent nøsini aftur móti klettunum eftir lokna lestrartíð*

føroyingum, tá tey velja at fara uttanlands at nema sær útbúgving og passar skrivstovuna hjá felagsskapinum í Århus.

-Viteigaathavaútbúgvingartilboð í Føroyum á bachelorstøði, men tað hevur týdning fyri alheimsgerðina at koma burtur. Ikki endiliga til Danmarkar, sigur Jákup Sverri Kass, sum ikki dugir at síggja nakað endamál í at hava allar útbúgvingar í Føroyum.

- So langt koma vit ongantíð.

## Minni tilknýti til føroyingar

Kjakið um, at føroyingar í lestrarørindum uttanlands ikki koma heimaftur at búgva, hevur MFS eisini tosað um. Ein orsøk til tað kann vera, at føroyingafeløgini hava ikki somu ávirkan í dag sum fyri tíggju árum síðani. Tá var vanligt, at tú noyddist í føroyingahúsið, um tú eitt nú hevði hug at lesa bløðini. Í dag finnast føroysku bløðini á internetinum og portalar av ymsum slagi finnast eisini. Jákup Sverri Kass heldur, at føroyingar duga betri at fella inn í samfelagið, sum tey flyta til í dag enn fyrr.

- Tørvurin á at koma í føroyingahúsið at frætta tíðindi er ikki tann sami í hesum tøkniligu døgum, sigur Jákup Sverri Kass og av tí sama verður tilknýtið millum føroyingarnir minni.

Hann heldur, at tað hevði hjálpt, um føroysku deplarnir uttan fyri Føroyar vórðu styrktir, og samstundis undrast hann eisini á, at tað bert er føroyingafelagið í Keypmannahavn, sum fær pengar úr landskassanum.

- Mangan verður ført fram, at man ikki ynskir, at føroyingar í ov stóran mun finna saman uttanlands, samstundis sum føroyingafelagið í Keypmannahavn fær 1,4 milliónir á fíggjarlógini, staðfestir Jákup Sverri Kass.

MFS arbeiðir í løtuni við at fáa ein datagrunn, har tað ber til at síggja, hvørjir føroyingar lesa uttanlands. Hvar teir lesa, hvat teir lesa og hvussu nógv teir hava eftir. Á hendan hátt skal tað bera til hjá føroyskum fyritøkum at finna møgulig framtíðar starvsfólk, sum tey so kunnu seta seg í samband við. Hendan ætlanin er tó ikki komin so langt enn.

## Venja seg við frástøðuna

Í Føroyum verður ofta ført fram, at tað helst ikki skal taka ov langa tíð at koma til arbeiðis. Men tá so fólk flyta uttanlands, kann tað gerast neyðugt at koyra í ein ella tveir tímar fyri at koma til arbeiðis ella í skúla.

- Tað er typiskt fyri føroyingar at aftra seg orsakað av frástøðu, heldur Jákup Sverri Kass og vísir samstundis á, at í takt við útbyggingunum av vegakervinum í Føroyum, áttu føroyingar at vant seg við at ferðast meiri aftur og fram til arbeiðis. Harafturat ger tøknin í dag, at fólk ikki altíð noyðast at siga á arbeiðsplássinum. Og tað heldur Jákup Sverri er ein stórur fyrimunur. Serliga tá tað kemur til gransking.

- Føroyingar áttu at notið ágóðan av øðrum, slær hann fast.

Hann heldur, at tað ræður um hjá føroyingum at finna nøkur ting, sum føroyingar eru dugnaligir í og so ment vitanina við at fingið útlendskar granskarar til Føroya.

- Ein tílíkur granskar í til dømis fiskivinnu kundi so verið á einum granskingardepli í Føroyum og oyst av sær sínar royndir innan eitt ávíst økið, vísir Jákup Sverri á.